Løgtingslóg

um

broyting í lovbekendtgørelse om straffeloven (Revsilógin)
(Landasvik og onnur brotsverk ímóti sjálvsavgerðarrætti og trygd Føroya fólks o.a., brotsverk ímóti stýrisskipanini og landsmyndugleikum føroyinga, yvirgangur o.a., alvandasom brotsverk, ymsar gerðir, sum eru til skaða fyri almenningin, bidding og skaðiligt inntøkuvirksemi og brotsverk í familjuni)

§ 1

Í Revsilógini, sambært lovbekendtgørelse nr. 215 af 24. juni 1939 om straffeloven, sum seinast broytt við løgtingslóg nr.142 frá 9. oktober 2020, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Heitið á parti II "Særlig del" verður strikað og í staðin verður sett:

"**Partur II**
Serligur partur"

2. Kapittul 12 verður orðaður soleiðis:

"**Kapittul 12**
Landasvik og onnur brotsverk ímóti sjálvsavgerðarrætti og trygd Føroya fólks o.a.

§ 98. Tann, sum fremur eina gerð, ið miðar eftir við útlendskari hjálp, við valdsnýtslu ella við hóttan um valdsnýtslu at loysa ella leggja Føroyar ella partar av Føroyum undir fremmant vald, verður revsaður við fongsli í upp til lívstíð.
Stk. 2. Eftir ásetingini í stk. 1 verður eisini tann revsaður, sum við nevnda endamáli skipar fyri umfatandi sabotasju, framleiðslustongsli ella ferðslustongsli, og tann, sum luttekur í slíkum virksemi og er vitandi um endamálið við tí.

§ 99. Tann, sum fremur eina gerð, ið miðar eftir at koma Føroyum ella okkara sameindu út í kríggj, herseting ella annan fíggindaskap, sum til dømis avbyrging ella annan tvingsil, ella sum aðramáta virkar fyri at skerja avgerðarrætt Føroya við útlendskari hjálp, verður revsaður við fongsli í upp til lívstíð.
Stk. 2. Við herseting er her og aðrastaðni í kapitlunum 12 og 13 at skilja fremmand herseting av Føroyum, tá ið og so leingi hon verður sett í verk við valdsnýtslu ella við hóttan um valdsnýtslu.

§ 100. Tann, sum við almennum útsøgnum eggjar til ella sum fremur eyðsýndan vanda fyri fíggindaskapi ímóti Føroyum, verður revsaður við fongsli í upp til 6 ár.
Stk. 2. Tann, sum við almennum útsøgnum eggjar til ella sum fremur eyðsýndan vanda fyri, at fremmandavald leggur seg út í føroysk viðurskifti, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 1 ár.

§ 101. Tann, sum við kríggi, herseting ella øðrum fíggindaskapi í hyggju fremur eina gerð, sum fyrireikar stuðul til fíggindan, verður revsaður við fongsli í upp til 16 ár.

§ 102. Tann, sum í kríggi ella undir herseting stuðlar fíggindanum við ráði

ella verki, ella sum fyri at fremja fíggindalig áhugamál veikir stríðsføri ríkisins ella stríðsfelaga tess, verður revsaður við fongsli í upp til 16 ár.
Stk. 2. Sum stuðul til fíggindan eru at rokna hesi viðurskifti:

1) Innskriving til ella hertænasta fyri vápnað lið hjá fíggindaligum hernaðarvaldi ella hersetingarvaldi ella fyri tilknýtta hernaðardeild ella løgregludeild ella aðra tílíka deild ella annan tílíkan felagsskap.
2) Sivilt funktionerarbeiði undir løgreglumyndugleika ella fongsulsmyndugleika hjá fíggindaligum hernaðarvaldi ella hersetingarvaldi, um arbeiðið fevnir um luttøku í avhoyringum ella vaktarhaldi av fangum.
3) Smettan ella líknandi gerð, sum elvir til, at onkur verður handtikin ella verður fyri handtøku ella meini av fíggindaligum myndugleika ella samstarvandi felagsskapi ella persóni.
4) Propaganda fyri fíggindaligt hernaðarvald ella hersetingarvald, herímillum virksemi sum útgevari, ritstjóri ella fyrisitari á dagblaði, tíðarriti, forlagi ella tíðindastovu, sum arbeiðir fyri at fremja fíggindalig áhugamál.
5) Munandi fíggjarligur stuðul til at fremja propagandu soleiðis sum hon er lýst undir nr. 4, ella til flokk ella felagsskap, sum á óhøviligan hátt samstarvar við fíggindaliga hernaðarvaldið ella hersetingarvaldið ella fremur áhugamál tess.

Stk. 3. Er talan um smettan sambært stk. 2, nr. 3, sum er gjørd undir slíkum umstøðum, at gerningsmaðurin hevur skilt, at hann er komin onkrum í hóttandi vanda fyri at missa lívið, fáa munandi skaða á likam ella heilsu, verða førdur av landinum ella verða frælsisskerdur í longri tíð, ella er brot framt á §§ 245, 246 ella 250 fyri á tann hátt at tvinga fram frágreiðing ella játtan ella aðramáta sum liður í mishandling av fangum, kann fongsul upp til lívstíð dømast.

§ 103. Tann, sum í kríggi ella undir herseting, ella tá ið stórur vandi er fyri kríggi ella herseting, misrøkir sáttmála viðvíkjandi fyriskipanum, ið føroyskir myndugleikar av hesi orsøk hava avgjørt at seta í verk, ella sum aðramáta arbeiðir ímóti slíkum fyriskipanum, verður revsaður við fongsli í upp til 3 ár.
Stk. 2. Er sáttmálin misrøktur av grovum ósketni, er revsingin sekt ella fongsul í upp til 4 mánaðir.

§ 104. Tann, sum á óhøviligan hátt, beinleiðis ella gjøgnum millumlið, samstarvar vinnuliga við fíggindaligt hernaðarvald ella hersetingarvald, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 8 ár.
Stk. 2. Revsiábyrgd eftir stk. 1 kann verða løgd á ein og hvønn, sum hevur havt leiðandi starv í viðkomandi fyritøku. Revsiábyrgd kann somuleiðis verða løgd á onnur starvsfólk í fyritøkuni, um tey fyri sín part hava havt serliga ódámliga framferð.
Stk. 3. Tá ið gjørt verður av, um framferðin hevur verið óhøvilig, og hvussu óhøvilig hon hevur verið, skal umframt týdningin, sum fyritøkan hevur fyri tað fíggindaliga hernaðarvaldið ella hersetingarvaldið, serliga verða havt í huga, um viðkomandi:

1) sjálvur hevur virkað fyri at fáa í lag, halda fram við ella víðka um handilssambandið,
2) til frama fyri fíggindan av sínum eintingum hevur umskipað fyritøkuna ella hevur fingið ella hevur roynt at fáa størri ella skjótari framleiðslu enn kravt,
3) hevur biðið fíggindan hjálpa sær mótvegis føroyskum myndugleikum til frama fyri egin áhugamál,

4) hevur forðað ella roynt at forða føroyskum myndugleikum at fáa fulla atgongd at kunna seg um viðurskifti hjá fyritøkuni, ella
5) hevur fingið ella roynt at fáa órímiligan vinning ella aðrar fyrimunir, sum ikki hava verið rímiliga grundaðir handilsliga.

§ 105. Tann, sum undir herseting fremur eina gerð, ið miðar eftir at fáa hersetingarvaldið ella felagsskap ella persón, ið samstarvar við tað, til at gera seg inn á avgerðarrættin hjá føroyskum myndugleikum, ella sum á óhøviligan hátt misnýtir samband við hersetingarvaldið ella felagsskap ella persón, ið samstarvar við tað, fyri at vinna sær sjálvum ella øðrum serligan fyrimun, verður revsaður við fongsli í upp til 8 ár.

§ 106. Tann, sum virkar ímóti tørvi landsins í starvi, sum honum er latið fyri Føroyar at samráðast um ella avgera eitthvørt við fremmant land, verður revsaður við fongsli í upp til 16 ár.

§ 107. Tann, sum í tænastu fyri fremmant vald ella fremmandan felagsskap ella til nýtslu hjá nøkrum, sum er í slíkari tænastu, kannar ella gevur upplýsingar um viðurskifti, ið skulu haldast loynilig við fyriliti fyri landsáhugamálum ella samfelagsáhugamálum, verður, sama um upplýsingarnar eru rættar ella ei, revsaður fyri njósnan við fongsli í upp til 16 ár.
Stk. 2. Snýr tað seg um viðurskifti, sum nevnd eru í § 109, ella verður gerðin framd í kríggi ella undir herseting, kann revsingin vaksa til fongsul í upp til lívstíð.

§ 108. Tann, sum, hóast gerðin ikki kemur undir § 107, í aðramáta ger nakað, sum gevur fremmandari fregnartænastu møguleikan til, ella sum hjálpir henni til beinleiðis ella óbeinleiðis at virka í landinum, verður revsaður við fongsli í upp til 6 ár.
Stk. 2. Snýr tað seg um upplýsingar um hernaðarlig viðurskifti, ella verður virksemið framt í kríggi ella undir herseting, kann revsingin vaksa til fongsul í upp til 12 ár.

§ 109. Tann, sum avdúkar ella víðarigevur upplýsingar um loyniligar samráðingar, ráðleggingar ella avgerðir hjá landinum í málum, sum trygd landsins ella rættindi við fremmand lond er treytað av, ella sum snúgva seg um týðandi samfelagsbúskaparlig áhugamál við útlond, verður revsaður við fongsli í upp til 12 ár.
Stk. 2. Verða nevndu gerðir gjørdar av ósketni, er revsingin sekt ella fongsul í upp til 3 ár.

§ 110. Tann, sum falsar, oyðileggur ella burturbeinir skjal ella lut, sum hevur týdning fyri trygd landsins ella rættindi við fremmand lond, verður revsaður við fongsli í upp til 16 ár.
Stk. 2. Verða nevndu gerðir gjørdar av ósketni, er revsingin sekt ella fongsul í upp til 3 ár.

§ 110 a. Við sekt ella fongsli í upp til 3 ár verður tann revsaður, sum tilætlað ella av ósketni uttan neyðugt loyvi:
1) greiðir frá, tekur mynd av ella á annan hátt avmyndar hernaðarligar verjustøðir, goymslur, deildir, vápn, útgerð ella tílíkt hjá ríkinum, sum ikki er almannaatgongt, ella sum margfaldar ella almannakunnger tílíkar frágreiðingar ella myndir, ella
2) almannakunnger avgerðir, sum snúgva seg um herbúgving til stríð ella aðra hernaðartilbúgving hjá ríkinum.

§ 110 b. Við fongsli í upp til 8 ár verður tann revsaður, sum viðvirkar til,

at fremmandavald ger seg inn á uttanveltastøðu ríkisins.

§ 110 c. Tann, sum brýtur áseting ella forboð, ið givin eru sambært lóg sum vernd av verjufyriskipan ella uttanveltafyriskipan ríkisins, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 4 mánaðir ella undir serliga skerpandi umstøðum við fongsli í upp til 3 ár.
Stk. 2. Við sekt ella fongsli í upp til 4 mánaðir ella undir serliga skerpandi umstøðum við fongsli í upp til 4 ár verður tann revsaður, sum brýtur áseting ella forboð, ið givin eru sambært lóg fyri at kunna røkja skyldur ríkisins sum limur í Sameindu Tjóðum.
Stk. 3. Verður brot framt á stk. 1 ella 2 av ósketni, er revsingin sekt ella fongsul í upp til 2 ár.

§ 110 d. Verður nakað av teimum brotsverkum, sum lýst eru í kapitlunum 25, 26 og 27, framt ímóti útlendskum ríkisleiðara ella leiðara á útlendskari sendistovu, kann revsingin, sum har er lýst, vaksa við upp í eina helvt, um ikki gerðin er fevnd av kapitli 13.

§ 110 e. Við sekt ella fongsli í upp til 2 ár verður tann revsaður, sum alment háðar fremmanda tjóð, fremmant land, flagg tess ella annað viðurkent tjóðarmerki ella flaggið hjá Sameindu Tjóðum ella hjá Evroparáðnum.

§ 110 f. Brotsverk í hesum kapitli verða altíð lógsøkt við almennari átalu eftir boðum frá løgmálaráðharranum.

§ 110 g. Á sama hátt verður tann revsaður, sum fremur tær í §§ 98-110 nevndu gerðir mótvegis danska statinum ella myndugleikum hansara herundir kongi, Fólkatingi og Hægstarætti."

3. Kapittul 13 verður orðaður soleiðis:

"**Kapittul 13**
Brotsverk ímóti stýrisskipan og landsmyndugleikum føroyinga, yvirgangur o.a.

§ 111. Tann, sum fremur eina gerð, ið miðar eftir við útlendskari hjálp, valdsnýtslu ella hóttan um valdsnýtslu at broyta stýrisskipanina ella at seta hana úr gildi, verður revsaður við fongsli í upp til lívstíð.

§ 112. Tann, sum fremur eina gerð, ið miðar eftir at taka lívið av tí, sum við heimild í stýrisskipanini leiðir landsstýrið, verður revsaður við fongsli í minst 6 ár.

§ 113. Tann, sum ger seg inn á trygd ella frælsi Løgtingsins ella aðramáta fremur eina gerð, ið miðar eftir við valdsnýtslu ella hóttan um valdsnýtslu at noyða Løgtingið til at taka eina avgerð ella at forða tí í at virka frítt og frælst, verður revsaður við fongsli í upp til 16 ár ella undir serliga skerpandi umstøðum við fongsli í upp til lívstíð.
Stk. 2. Somu revsing fær tann, sum á samsvarandi hátt loypur á ella fremur tvingsil ímóti tí, sum við heimild í stýrisskipanini leiðir landsstýrið, ella ímóti landsstýrismonnum.

§ 114. Fyri yvirgang verður tann revsaður við fongsli í upp til lívstíð, sum við ætlan um at loypa stóra ræðslu á íbúgvarnar í einum landi, ella av óróttum at tvinga føroyskar ella útlendskar almennar myndugleikar ella altjóða felagsskap til at gera ella lata vera við at gera okkurt, ella at avlaga ella oyðileggja grundleggjandi politiska, stýrisskipanarliga, búskaparliga ella samfelagsliga bygnaðin í einum landi ella altjóða felagsskapi, fremur eina ella fleiri av fylgjandi gerðum, tá ið slag av gerð ella samanhangurin, gerðin verður

framd í, kann gera einum landi ella altjóða felagsskapi munandi skaða:

1) Manndráp eftir § 237.
2) Grovan harðskap eftir §§ 245 ella 246.
3) Frælsistøku eftir § 261.
4) Órógv á ferðslutrygdina eftir § 184, stk. 1, ólógligt órógv á raksturin av vanligum samferðslutólum o.ø. eftir § 193, stk. 1, ella umfatandi herverk eftir § 291, stk. 2, um hesi lógarbrot verða framd á ein hátt, sum kann koma mannalívum í vanda ella hava við sær munandi fíggjarligt tap.
5) Rán av flutningsfari eftir § 183 a.
6) Brot á lóggávuna um vápn og spreingievni undir serliga skerpandi umstøðum eftir § 192 a.
7) Eldáseting eftir § 180, spreinging, spjaðing av skaðaelvandi loftevni, vatnflóð, skipbrot ella aðra flutningsvanlukku eftir § 183, stk. 1 og 2, heilsuskaðiliga dálking av vatnveiting eftir § 186, stk. 1, heilsuskaðiliga dálking av lutum, ætlað til vanliga útbreiðslu o.a. eftir § 187, stk. 1.
8) Handhavan ella nýtslu o.a. av geislavirknum evnum eftir § 192 b.

Stk. 2. Á sama hátt verður tann revsaður, sum við teirri tilætlan, ið nevnd er í stk. 1, flytur vápn ella spreingievni.

Stk. 3. Á sama hátt verður eisini tann revsaður, sum við teirri tilætlan, ið nevnd er í stk. 1, hóttir við at fremja onkra av teimum gerðum, sum nevndar eru í stk. 1 og 2.

§ 114 a. Verður ein av gerðunum í nr. 1-7 framd, uttan at treytirnar fyri at revsa eftir § 114 eru til staðar, kann revsingin fara upp um strangastu revsingina fyri lógarbrotið við upp í eina helvt. Er strangasta revsing fyri viðkomandi gerð minni enn 4 ára fongsul, kann hon tó vaksa til fongsul í upp til 6 ár:

1) Brot á § 180, § 181, stk. 1, § 183, stk. 1 ella 2, § 183 a, § 184, stk. 1, § 192 a, § 193, stk. 1, §§ 237, 244-246, 250, § 252, stk. 1, § 266, § 288 ella § 291, stk. 1 ella 2, tá ið gerðin er fevnd av artikli 1 í millumtjóðasáttmála frá 16. desember 1970 um at basa ólógligari valdstøku av loftførum, artikli 1 í millumtjóðasáttmála frá 23. september 1971 um at basa ólógligum gerðum ímóti trygdini í sivilu loftferðsluni ella artikli 2 í ískoytissáttmálanum frá 24. februar 1988 um at basa ólógligum valdsgerðum í floghavnum, sum avgreiða altjóða sivilu loftferðsluna, sambært skjali 1, nr. 1 og 2.
2) Brot á § 180, § 181, stk. 1, § 183, stk. 1 ella 2, § 184, stk. 1, §§ 237, 244-246, 250, § 252, stk. 1, § 260, § 261, stk. 1 ella 2, § 266 ella § 291, stk. 1 ella 2, tá ið gerðin er fevnd av artikli II í millumtjóðasáttmála frá 14. desember 1973 um at fyribyrgja og revsa brotsverk ímóti altjóða vardum persónum, herímillum sendifólkum, sambært skjali 1, nr. 3.
3) Brot á § 261, stk. 1 ella 2, tá ið gerðin er fevnd av artikli 1 í millumtjóðasáttmála frá 17. desember 1979 ímóti gíslatøku, sambært skjali 1, nr. 4.
4) Brot á § 180, § 181, stk. 1, § 183, stk. 1 ella 2, § 186, stk. 1, §§ 192 a, 192 b, 237, 244-246, 260, 266, 276, 278, 279, 279 a, 281, 288 ella § 291, stk. 2, tá ið gerðin er fevnd av artikli 7 í IAEA-sáttmálanum, Sáttmálanum hjá The International Atomic Energy Agency, frá 3. mars 1980 um fysiska vernd av kjarnorkutilfari, sambært skjali 1, nr. 5.
5) Brot á § 180, § 181, stk. 1, § 183, stk. 1 ella 2, § 183 a, § 184, stk. 1, § 192 a, § 193, stk. 1, §§ 237, 244–

246, § 252, stk. 1, §§ 260, 266, 288 ella § 291, stk. 1 ella 2, tá ið gerðin er fevnd av artikli 3 í millumtjóðasáttmála frá 10. mars 1988 um at basa ólógligum gerðum ímóti sjótrygdini ella artikli 2 í ískoytissáttmálanum frá 10. mars 1988 um at basa ólógligum gerðum ímóti trygdini á fastfestum oljupallum á landgrunninum, sambært skjali 1, nr. 6 og 7.

6) Brot á § 180, § 181, stk. 1, § 183, stk. 1 ella 2, § 183 a, § 184, stk. 1, § 186, stk. 1, § 192 a, § 193, stk. 1, §§ 237, 244-246, 250, § 252, stk. 1, § 266 ella § 291, stk. 2, tá ið gerðin er fevnd av artikli 2 í millumtjóðasáttmála frá 15. desember 1997 um at basa yvirgangsbumbing, sambært skjali 1, nr. 8.
7) Brot á § 192 b, § 260 ella § 266, tá ið gerðin er fevnd av artikli 2 í millumtjóðasáttmála frá 13. apríl 2005 um at basa kjarnorkuyvirgangi, sambært skjali 1, nr. 9.

§ 114 b. Við fongsli í upp til 10 ár verður tann revsaður, sum beinleiðis ella óbeinleiðis til ein persón, til ein bólk ella til eina samskipan, sum fremur ella ætlar at fremja eina gerð, sum er fevnd av §§ 114 ella 114 a:

1) veitir fíggjarstuðul,
2) útvegar ella savnar inn fígging ella onnur ráð, ella
3) letur pening, ognarlutir ella fíggjarligar ella aðrar slíkar veitingar at ráða yvir.

§ 114 c. Við fongsli í upp til 10 ár verður tann revsaður, sum útvegar ein persón til at fremja ella stuðla undir gerðir, ið fevndar eru av §§ 114 ella 114 a, ella til at fara upp í ein bólk ella eina samskipan fyri at stuðla undir, at bólkurin ella samskipanin fremur gerðir av hesum slag. Undir serliga skerpandi umstøðum kann revsingin vaksa til fongsul upp í 16 ár. Sum serliga skerpandi umstøður eru serstakliga at rokna brot, sum eru av regluligum ella skipaðum slag.
Stk. 2. Við fongsli í upp til 6 ár verður tann revsaður, sum útvegar ein persón til at fremja ella stuðla undir gerðir, ið fevndar eru av § 114 b, ella til at fara upp í ein bólk ella eina samskipan fyri at stuðla undir, at bólkurin ella samskipanin fremur gerðir av hesum slag.
Stk. 3. Við fongsli í upp til 6 ár verður tann revsaður, sum tekur við boði at fremja gerðir, ið fevndar eru av §§ 114 ella 114 a. Virkar viðkomandi fyri eitt vápnað lið, kann revsingin vaksa til fongsul upp í 10 ár ella undir serliga skerpandi umstøðum til fongsul upp í 16 ár. Sum serliga skerpandi umstøður eru serstakliga at rokna slíkar, har viðkomandi hevur verið við í bardaga.

§ 114 d. Við fongsli í upp til 10 ár verður tann revsaður, sum venur, vegleiðir ella á annan hátt lærir upp ein persón at fremja ella stuðla undir gerðir, ið eru fevndar av §§ 114 ella 114 a, vitandi um, at persónurin ætlar at nýta førleikarnar til hetta endamál. Undir serliga skerpandi umstøðum kann revsingin vaksa til fongsul upp í 16 ár. Sum serliga skerpandi umstøður eru serstakliga at rokna brot, sum eru av regluligum ella skipaðum slag.
Stk. 2. Við fongsli í upp til 6 ár verður tann revsaður, sum venur, vegleiðir ella á annan hátt lærir upp ein persón at fremja ella stuðla undir gerðir, ið eru fevndar av § 114 b, vitandi um, at persónurin ætlar at nýta teir tillærdu førleikarnar til hetta endamál.
Stk. 3. Við fongsli í upp til 6 ár verður tann revsaður, sum letur seg venja, vegleiða ella á annan hátt læra upp at fremja gerðir, ið eru fevndar av §§ 114 ella 114 a.

§ 114 e. Við fongsli í upp til 6 ár verður tann revsaður, sum á annan hátt

stuðlar virksemi hjá persóni, bólki ella samskipan, sum fremur ella ætlar at fremja gerðir, ið eru fevndar av §§ 114, 114 a, 114 b, 114 c ella 114 d. Virkar viðkomandi fyri eitt vápnað lið, kann revsingin vaksa til fongsul í upp til 10 ár ella undir serliga skerpandi umstøðum til fongsul í upp til 16 ár. Sum serliga skerpandi umstøður eru serstakliga at rokna slíkar, har viðkomandi hevur verið við í bardaga.

§ 114 f. Tann, sum, uttan at tilburðurin er fevndur av §§ 114-114 e, luttekur í ella veitir munandi fíggjarstuðul ella annan munandi stuðul til deildir, bólkar ella samskipanir, sum við valdsnýtslu ætla at ávirka almenn viðurskifti ella at elva til órógv á samfelagsskipanina, verður revsaður við fongsli í upp til 6 ár.

§ 114 g. Tann, sum, uttan at tilburðurin er fevndur av §§ 114-114 f, luttekur í ólógligum hernaðarligum felagsskapi ella bólki, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 2 ár.

§ 114 h. Tann, sum frá bólki ella samskipan, ið fremur ella ætlar at fremja gerðir, ið eru fevndar av §§ 114 ella 114 a, tekur ímóti peningaligum stuðli ella veitingum at brúka til at skipa ella reka stovn ella fyritøku ella til líknandi endamál her á landi, verður revsaður við fongsli í upp til 6 ár.

§ 115. Verður brotsverk, sum nevnt er í kapitlunum 25, 26 og 27, gjørt ímóti tí, sum við heimild í stýrisskipanini leiðir landsstýrið, uttan at treytirnar fyri at revsa eftir §§ 112 og 113 eru til staðar, verða revsingarnar, sum har eru lýstar, herdar upp til tað dupulta.

§ 116. Tann, sum forðar ella roynir at forða fyri, at val verður hildið til Løgtingið, Fólkatingið, kommunustýri ella til kommunal ella onnur almenn ráð ella myndugleikar, ella sum reingir valúrslit, ella sum ger tað ómøguligt at gera úrslitið upp, verður revsaður við fongsli í upp til 6 ár.
Stk. 2. Sama revsing verður nýtt, tá ið slíkar gerðir verða gjørdar í sambandi við lógarheimilaðar beinleiðis atkvøðugreiðslur um almenn viðurskifti.

§ 117. Við sekt ella fongsli í upp til 2 ár verður tann revsaður, sum á teimum valum ella atkvøðugreiðslum, ið nevnd eru í § 116:

1) av órøttum skaffar sær ella øðrum atgongd til at luttaka í atkvøðugreiðsluni,
2) við ólógligum tvingsli sambært § 260 við frælsistøku ella við misnýtslu av støðu síni í hægri starvi roynir at fáa onkran til at atkvøða á ávísan hátt ella til at lata vera við at atkvøða,
3) við sviki elvir til, at onkur ímóti ætlan síni letur vera við at atkvøða, ella at atkvøðan hjá viðkomandi verður ógildig ella virkar øðrvísi enn ætlað,
4) veitir, lovar ella bjóðar fram fíggjarligan fyrimun fyri at ávirka onkran til at atkvøða á ávísan hátt ella til at lata vera við at atkvøða, ella
5) tekur ímóti, krevur ella letur lova sær fíggjarligan fyrimun fyri at atkvøða á ávísan hátt ella til at lata vera við at atkvøða.

§ 118. Tann, sum við valdsnýtslu ella hóttan um valdsnýtslu ella við misnýtslu av ótta fyri uppílegging frá fremmandavaldi forðar ella roynir at forða almennum myndugleika í at virka frítt og frælst, verður, tá ið gerðin verður framd fyri at ávirka almenn viðurskifti ella at elva til órógv á samfelagsskipanina, revsaður við fongsli í upp til 12 ár.
Stk. 2. Somu revsing fær tann, sum við teirri ætlan og tí framferðarhátti, sum nevnd eru í stk. 1, ger seg álvarsliga

inn á framsøgufrælsið ella forðar felagsskapum ella øðrum samskipanum í at útinna lógliga virksemi sítt frítt og frælst.
Stk. 3. Somu revsing fær eisini tann, sum við teirri ætlan og tí framferðarhátti, sum nevnd eru í stk. 1, fremur tað brotsverk, sum umrøtt er í § 193, ella aðra alvandasama gerð.

§ 118 a. Brotsverkini, sum nevnd eru í §§ 111-115 og 118, verða altíð lógsøkt við almennari átalu eftir boðum frá løgmálaráðharranum.

§ 118 b. Á sama hátt verður tann revsaður, sum fremur tær í §§ 111-116 nevndu gerðir ímoti danska statinum ella myndugleikum hansara herundir kongi, Fólkatingi og Hægstarætti.
Stk. 2. Verður brotsverk, sum nevnt er í kapitlunum 25, 26 og 27, framt ímóti kongi, uttan at treytirnar fyri at revsa eftir §§ 112 og 113 eru til staðar, verða revsingarnar, sum har eru lýstar, herdar upp til tað dupulta.
Stk. 3. Verður eitt av nevndu brotsverkum framt ímóti drotning, einkjudrotning ella trónuarvinga, kann revsingin vaksa við upp í eini helvt."

4. Kapittul 20 verður orðaður soleiðis:

"**Kapittul 20**
Alvandasom brotsverk

§ 180. Setur onkur eld á egna ella annans ogn undir slíkum umstøðum, at hann skilur, at hann harvið setur lívið hjá øðrum í hóttandi vanda, ella hann ger tað við tilætlan um at gera umfatandi skaða á annans ogn ella til at fremja uppreistur, púrgan ella aðra slíka órógv á samfelagsskipanina, verður hann revsaður við fongsli í upp til lívstíð.

§ 181. Tann, sum annars elvir til eldsbruna á annans ogn, verður revsaður við fongsli í upp til 6 ár.
Stk. 2. Á sama hátt verður tann revsaður, sum við tilætlan um at svika brunatryggingina ella at gera seg inn á rættindi hjá veðhava, ella sum við líknandi løgleysari tilætlan elvir til eldsbruna á egna ogn ella á annans ogn við samtykki eigarans.
Stk. 3. Revsingin kann vaksa til fongsul í upp til 10 ár, um talan er um serliga skerpandi umstøður.

§ 182. Tann, sum av ósketni elvir til eldsbruna á annans ogn ella til bága fyri annans ognaráhugamál, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 2 ár.

§ 183. Tann, sum við tilætlan um at gera skaða á annan persón ella annans ogn elvir til spreinging, at skaðaelvandi luftevni verða spjadd, vatnflóð, skipbrot ella aðra flutningsvanlukku, verður revsaður við fongsli í upp til 12 ár.
Stk. 2. Verður ein gerð, sum nevnd er í stk. 1, framd undir teimum umstøðum, sum nevndar eru í § 180, er revsingin fongsul í upp til lívstíð.
Stk. 3. Verður brotsverkið gjørt av ósketni, er revsingin sekt ella fongsul í upp til 2 ár.

§ 183 a. Tann, sum við ólógligum tvingsli sambært § 260 tekur ræðið á loftfari, sjófari ella øðrum felagsflutningsfari ella farmaflutningsfari ella órógvar stýringina, verður revsaður við fongsli í upp til lívstíð.
Stk. 2. Á sama hátt verður tann revsaður, sum við ólógligum tvingsli sambært § 260 tekur ræðið á frálandsvirki.

§ 184. Við sekt ella fongsli í upp til 2 ár ella undir serliga skerpandi umstøðum við fongsli í upp til 6 ár verður tann revsaður, sum, uttan at vera revsisekur eftir §§ 183 ella 183 a, órógvar rakstrartrygdina hjá førum,

motorakførum ella slíkum flutningsførum ella ferðslutrygdina á leiðum, ið ætlaðar eru til almenna ferðslu.
Stk. 2. Verður brotsverkið gjørt av ósketni, er revsingin sekt ella fongsul í upp til 4 mánaðir.

§ 185. Við sekt ella fongsli í upp til 2 ár verður tann revsaður, sum, hóast tað hevði borið honum til, uttan at hann ella onnur skuldu ovofrað seg, og uttan at hann skuldi komið sær sjálvum ella øðrum í nakran serligan vanda, letur vera við at geva rættstundis fráboðan um ella á annan eftir umstøðunum hóskandi hátt eftir førimuni at forða fyri eldsbruna, spreinging, at skaðaelvandi luftevni verða spjadd, vatnflóð, sjóskaða ella slíkari vanlukku, sum hevur við sær vanda fyri mannalívi.

§ 186. Tann, sum elvir til vanda fyri lívi ella heilsu manna við at elva til drekkivatnstrot ella við at lata heilsuskaðilig evnir í vatngoymslur, vatnleiðingar ella áir, verður revsaður við fongsli í upp til 10 ár.
Stk. 2. Verður brotsverkið gjørt av ósketni, er revsingin sekt ella fongsul í upp til 1 ár.

§ 187. Við fongsli í upp til 10 ár verður tann revsaður:
1) sum í lutir, ið eru ætlaðir til at selja ella til algongda nýtslu, letur eitur ella onnur evni, soleiðis at heilsan hjá fólki kemur í vanda, um lutirnir verða brúktir samsvarandi endamálinum,
2) sum, tá ið slíkir lutir eru komnir soleiðis fyri spillu, at njótingin ella nýtslan av teimum á nevnda hátt er heilsuskaðilig, gevur teimum eina viðgerð, sum kann fjala spilluna, ella
3) sum við dyljing um framdu viðgerðina, setur til sølu ella aðramáta roynir at breiða út lutir, ið eru viðgjørdir soleiðis, sum nevnt er undir nr. 1 og 2.

Stk. 2. Verður brotsverkið gjørt av ósketni, er revsingin sekt ella fongsul í upp til 1 ár.

§ 188. Við sekt ella fongsli í upp til 6 ár verður tann revsaður, sum, uttan at vera revsisekur eftir § 187, stk. 1, nr. 3, við dyljing um heilsuskaðiliga standin á lutinum setur til sølu ella aðramáta roynir at fáa breitt út:
1) føðsluevni ella njótingarevni, sum orsakað av spillu, vantandi tilgerð, goymsluhátti ella av líknandi orsøkum eru heilsuskaðilig, ella
2) nýtslulutir, sum við vanligum brúki seta heilsu manna í vanda.

Stk. 2. Verður brotsverkið gjørt av ósketni, er revsingin sekt ella fongsul í upp til 4 mánaðir.

§ 189. Tann, sum setur til sølu ella aðramáta roynir at breiða út sum heilivág ella sjúkufyribyrgjandi evni, lutir, sum hann veit ikki eru nýtiligir til hesi endamál, og at nýtslan av teimum hartil setur lív ella heilsu manna í vanda, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 6 ár.
Stk. 2. Verður brotsverkið gjørt av ósketni, er revsingin sekt ella fongsul í upp til 4 mánaðir.

§ 190. Verður undir samsvarandi treytum sum í §§ 186-189 bert lív ella heilsa hjá húsdýrum sett í vanda, er revsingin sekt ella fongsul í upp til 6 ár.

